# Bilar

Nr. 221 • hósdagur • 18. november 2004 • 78. árg.

Nýggjur Audi A6 Avant í apríl:

# Viðførið skal eisini hava tað gott



*Audi A6 Avant er ein smartur og framkomin luksus stationcar við sportligum designi*

**Audi kalla sínar stationcar fyri Avant, har stórur dentur er lagdur á smart design. Í apríl 2005 kemur Avant útgávan av A6, ið er vaksin nakað í mun til forgangaran**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*



*Sum eykaútgerð fæst ein liðilig skinnaraskipan, har viðførisrúmið kann deilast upp í smærri eindir*



*Eisini fæst A6 Avant við baklúku, ið kann latast upp og aftur automatiskt og trinleyst*



*Dugnaligu designararnir leggja dentur á, at ein Audi skal vera til gleði fyri tey sum síggja bilin, og ikki minst fyri tey sum ogna sær ein slíkan*

Tað er altíð spennandi, tá Audi koma við nýggjum modellum. Dugnaligu designararnir leggja dentur á, at ein Audi skal vera til gleði fyri tey sum síggja bilin, og ikki minst fyri tey sum ogna sær ein slíkan.

Talan er um ein sera smartan og framkomnan luksus stationcar við sportligum designi. Bilurin er vaksin nakað í mun til forgangaran.

Nýggi Audi A6 Avant er ein háteknologiskur bilur, har nógvir av lutunum eru úr aluminium.

A6 Avant hevur MMI (Multi Media Interface) sum standard. MMI er ein framkomin telduskipan við einum skíggja í instrumentborðinum við nógvum ymiskum funktiónum, sum verða stýrdar av einum knøtti í gardanboksini.

## Viðførið spent fast

Audi gera nógv fyri at viðførið skal hava tað gott. Tað vil siga at tað er trygt og væl spent fast. Sum eykaútgerð fæst ein liðilig skinnaraskipan, har viðførisrúmið kann deilast upp í smærri eindir.

Eisini fæst A6 Avant við baklúku, ið kann latast upp og aftur automatiskt og trinleyst.

Hondbremsan er elektromekanisk, sum aktiverast við eini kontakt í gardanboksini, og elektrohydrauliska servostýringin tillagar seg ferðina.

Bensinmotorarnir verða hesir: 2,4 litur V6 við 177 hk til, 3,2 litur V6 við 255 hk, og 4,2 litur V8 við 335 hk, dieselmotorarnir verða hesir: 2,7 litur V6 TDI við 180 hk, og 3,0 litur V6 TDI við 225 hk.

Audi A6 Avant kemur á føroyska og danska marknaðin í apríl 2005.



# Bilførarar fáa ikki frið at sovna við rattið

**Nú fáa bilførararnir skjótt ikki frið at sovna við rattið. Ein skipan í bilinum sigur frá um okkurt livandi - fólk ella djór - er longur frammi á koyribreytini, og nýggjastu xenon-forlyktirnar snara við, tá bilførarin snarar rattið**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*



*Ávaringarskipanir ið við radara siga frá, um bilurin koyrir ov tætt upp at øðrum bilum í ferðsluni*

Tað kemur so nógv spennandi nýtt á marknaðin, sum finnur veg inn í bilaídnaðin. Serliga er tað hernaðarídnaðurin, sum stendur fyri teimum mest framkomnu tøkniligu uppfinningunum.

Nú fáa bilførararnir skjótt ikki frið at sovna við rattið. Sum eykaútgerð til nýggja Citroën C5 fæst vegstrípu-alarmur, ið ger, at um bilurin koyrir um vegstrípurnar uttan at vísa av, fer førarasetrið at vibrera í tí síðuni, (høgru ella vinstru), sum bilurin hevur koyrt yvir vegstripuna, soleiðis at um bilførarin er sovnaður, skuldi hann vakna av vibratiónunum.

Sami bilur fæst eisini við nýggjastu xenon-lyktunum, sum snara við tá bilførarin snarar rattinum til høgru ella til vinstru. Hetta er ikki nøkur nýggjheit, tí fyri meira enn 30 árum síðan fekst tað eisini sum eykaútgerð til teir stóru Citroën ID 19, men tað vóru ikki xenon-lyktir, men vanligar perur.

## Tevjar fólk og djór

Nú fæst eisini ein skipan, sum sigur frá um nakað livandi er longur frammi á koyribreytini. XstraVue systemið er infrareytt ljós, sum í myrkri fangar hitastrálingar frá øllum livandi meira enn 200 metrar longri frammi á koyribreytini, sama um tað eru fólk ella djór.

Tað er so smart, at hetta infrareyða ljósið sæst ikki og blendar tí heldur ikki mótkoyrandi ferðslu.

Eisini finnast skipanir, sum við radara siga frá, um bilurin koyrir ov tætt upp at øðrum bilum í ferðsluni.



*Nýggí Citroën C5 fæst vegstrípu-alarmi, soleiðis at um bilførarin er sovnaður, skuldi hann vakna av vibratiónunum*



*Kontakt til vegstrípu alarm*



*Fleiri av nýggju xenon-lyktunum snara við tá bilførarin snarar rattinum*




*XstraVue systemið er infrareytt ljós, sum í myrkri fangar hitastrálingar frá øllum livandi meira enn 200 metrar longri frammi á koyribreytini, sama um tað eru fólk ella djór*

Við deyða Eywind Dalsgaard Henriksen´s:

## Peningagáva úr Føroyum til ferðslutrygd í Ribe Amt

Ribe Amts Trafiksikkerhedsudvalg hevur móttikið eina upphædd upp á 3.000 krónur til arbeiðið fyri ferðslutrygd í amtinum. Tað eru fólk í Føroyum, sum hava givið peningin.

Bakgrundin fyri innsavningini er ein syrgilig ferðsluvanlukka í Grindsted í august 2004, ið kostaði 20 ára gamla Eywind Dalsgaard Henriksen frá Grindsted lívið. Eywind vaks upp og búði í Grindsted, men hann hevur sínar røtur í Føroyum, har omman, abbin og pápin búgva.

"Idet jeg udtrykker min store medfølelse over for de efterladte, vil jeg gerne på trafiksikkerhedsudvalgets vegne sige tak for beløbet på 3000 kroner, som jeg kan forsikre for vil blive brugt i det løbende arbejde med at forbedre trafiksikkerheden i amtet og forebygge, at der sker færdselsulykker", sigur Palle Jørgensen, ið er formaður fyri Ribe Amts Trafiksikkerhedsudvalg.

Kunningin um gávuna verður gjørd eftir ynski hjá mammuni, sum vil at tey sum hava givið peningin skulu vita, at gávan er komin í rættar hendur.

## SsangYong í Kina



Stóra kinesiska bilfyritøkan SAIC (Shanghai Automotive Industry Corporation) hevur keypt 48,9 prosent í suðurkoreansku SsangYong bilverksmiðjuni fyri 500 mill. dollarar. Leiðslan í SAIC hevur stórar ætlanir við SsangYong

*Kelda: Motor Magasinet*

## Heimsins dýrasti Bentley



Á eini bilaktión í Onglandi bleiv ein Bentley Speed Six Tourer frá 1930 seldur fyri næstan 31. milliónir kr. Bilurin varð annars mettur til at hava eitt virði upp á millum 17 og 19 mill. kr.

*Kelda: Ekstra Bladet.dk*

## VW og Proton samstarva



VW-konsernin fer nú undir eitt nýtt samstarv í Fjareystri. Hesaferð er tað við malaysisku Proton bilverksmiðjuna. Proton bleiv stovnað í 70-unum í samstarvi við Mitsubishi, sum nú ynskja at selja síni partabrøv í Proton. Nakrir Proton koyra í Føroyum

*Kelda: Motor Magasinet*